

# Leyst starv í Tórshavnar kommunu

**Bókavørður til Býarbókasavnið**

Vegna barsilsfarloyvi er eitt tíðaravmarkað starv sum bókavørður leyst at søkja. Starvið, ið krevur útbúgving sum bókavørður, er fulltíðarstarv, 39 tímar um vikuna.

**Arbeiðsuppgávur**

Arbeiðið er lutvíst í útláninum og á barnabókasavninum. Harumframt snýr arbeiðið seg m.a. um skráseting og pr-arbeiði fyri bókasavnið.

**Setanarviðurskifti**

Starvið verður at seta 1. mai 2009 ella skjótast til ber. Løn sambært sáttmála við Starvsmannafelagið.

**Umsókn**

saman við prógvi, viðmælum og upplýsingum um starvsroyndir skulu vera hjá Tórshavnar kommunu, postboks 32, 110 Tórshavn, í seinasta lagi 20. mars 2009.

**Meira fæst at vita**

um starvið við at venda sær til Hanne Magnussen, bókavørð, telefon 30 20 30 ella til Jákup Simonsen, deildarleiðara á Mentamáladeildini, telefon 30 20 10.

**Tórshavnar kommuna**

---

FØROYA REIÐARAFELAG
FAROESHIPOWNERS´ASSOCIATION

## Føroya Reiðarafelag 100 ár

16. desember 2008 vóru 100 ár liðin síðani Føroya Reiðarafelag varð sett á stovn.

Í tí sambandinum verður móttøka í Listaskálanum

fríggjadagin 6. mars kl. 16.00 til 18.00

**Føroya Reiðarafelag**

---

# LÝSING FRÁ REYÐA KROSS FØROYA

**HANDIL VIÐ BÓKUM** við inngongd í Vágsbotni. Vit sóknast eftir persóni at samskipa arbeiði við bókhandlinum, sum hevur 17 hjálparfólk. Handilin stendur ómannaður. Keyparin rindar við at leggja peningin í eina bússu. Leiðarin skal skipa vaktirnar fyri upp- og afturlating, sortering og uppsetan av bókum og hava eftirlit við at mannagongdir vera fylgdar. Ein sera áhugaverd uppgáva. Øll arbeiða sjálvboðin.

**SKEIÐ Í 1. HJÁLP**
Ynskir tú at lære 1.hjálp hevur tú nú høvi til hetta.
Reyði Krossur Føroya skipar fyri 12 tímar grundskeiðið í 1. Hjálp í húsinum hjá Reyða Krossi í Vágsbotni.
06.03.09 kl. 18:00-20:00
07.03.09 kl. 10:00-17:00 (1 tími til mat)
14.03.09 kl. 16:00-20:00
Kostnaður kr. 700,00 fyri hvønn
Skeiðleiðari: Bo Warberg (283629)

**ENDURNÝTSLUHANDIL VIÐ KLÆÐUM**, skóm, brúkslutum og ymiskum skreyt- og prídíslutum við inngongd frá Bryggjubakka. Vit sóknast eftir persóni at samskipa arbeiði við endurnýtsluhandlinum, sum hevur 26 hjálparfólk. Sum er, er handilin opin gerandisdagar kl. 13:30-17:30 og leygardagar kl. 11:00-14:00. Leiðarin hevur ábyrgdina av at seta fólk og greiða frá uppgávum og ansa eftir at mannagongdir vera fylgdar. Ein sera áhugaverd uppgáva, har øll arbeiða sjálvboðin

Hava tit áhuga í nøkrum av hesum, ella at fáa upplýsingar um, hvørjar aðrar uppgávur eru, vend tær til:
Súna Vinther tlf. 283630 ella t-post: Suni@redcross.fo

**Reyði Krossur Føroya**
Postbox 1015 | Bryggjubakki 10 | Tel 319630
Fax 311217 | T-Post: redcross@redcross.fo

---

## Aðalfundur hjá Føroya Ellisakførum

**Leygardagin 14. mars 2009 kl. 16:00** verður aðalfundur hjá Føroya Ellisakførum

Fundurin verður hildin í hølum felagsins Yviri við Strond 22, Tórshavn



**Skrá fyri fundin:**
1. Val av orðstýrara
2. Formansfrágreiðing
3. Framløga av grannskoðaðum roknskapi
4. Viðgerð av innkomnum málum
5. Ásetan av limagjaldi og innlimingargjaldi
6. Val av nevndarlimum, tiltakslimum og grannskoðarum
7. Ymiskt

**Føroya Ellisakfør**
www.ellisakfor.com

---

Søkt verður eftir fólkið at arbeiða uml. 35 tímar um vikuna, at byrja skjótast gjørligt.

Áhugaði kunnu senda umsókn til:
**Babysam, Hoyvíksveg 61 100-Tórshavn.**

Um spurningar eru ring á tlf. 218848

BabySam®

Hoyvíksvegur 67 · Tórshavn · Tel. 315101 · Fax 315112 · babysam@post.olivant.fo

---

# Aðalfundur

**Hjá Eftirlønargrunni Føroya Arbeiðarafelags**

Aðalfundur grunnsins verður
**leygardagin 28. mars kl. 15.00**
í HB-húsinum í Gundadali, Tórshavn.

Dagsskrá sambært viðtøkum grunsins og møgulig viðtøkubroyting.

**Eftirlønargrunnur Føroya Arbeiðarafelags**